Orðaskifti:

# Ríkissjúkrahúsið v.m.

Í hesum døgum verður tjakað og illgitið um, hvør ið rinda rkostnaðin, tá ið vit føroyingar fáa viðgerð og upphald á donskum sjúkrahúsum, og her verður fyrst og fremst hugsað um ríkishospitalið.

Nakað av tí, ið er skrivað, tykist at hava støði í ókunnleika og lítla vitan um, hvussu tey fíggjarligu viðurskiftini veruliga eru við støði í galdandi lógum kunngerðum fyri Sjúkrahúsverk Føroya.

Skeita vit í landskassaroknskapin 1987 ella eldri, verða vit varug við, at undir § 12: Heilsumál er Ríkishospitalið ongastaðni at finna, meðan vit undir somu grein í landskassaroknskapinum 1988 kunnu lesa, at »Útreiðslurnar viðv. Ríkishospitalinum« vóru 22.5 milliónir. Orsøkin til hetta fyribrigdi er einføld tann, at útreiðslurnar til nevnda sjúkrahús als ikki vóru at finna í løgtingsfíggjarlógini fyrr enn í 1988, táið heildarveitingin (blokkskipanin) partvíst kom í gildi. Við at lesa lansdkassaroknskapirnar frá 1988 og fylgjandi ár síggja vit, hvussu nógv av blokkinum er farið til »Útreiðslur viðv. Ríkishospitalinum« til dømis í 1990 24 mió., 1995 32 mió. og 1998 37 mió.

Ein broyting er tó hend. Fyri nøkrum fáum árum síðani varð heitið »Útreiðslur viðv. Ríkishospitalinum« broytt til »Serviðgerð uttanlands«. (Um hetta hevði ein Sigmund Freud dugað at gjørt eina psykoanalysu).

Í lov nr. 521 af 22. desember 1976 for Færøerne om sygehusvæsenet er undir § 5 m.a. tilskilað »Sygehusenes overlæger har ret og pligt til at yde bistand og modtage bistand fra de øvrige sygehuse og ret til at sende patienter til behandling på sygehuse i Danmark. Nærmere regler herom fastsættes i det af landsstyret udfærdigede reglement for det færøske sygehusvæsen«.

Og við reglugerð fyri Sjúkrahúsverk Føroya (kunngerð nr. 70 frá 6. oktober 1977) hevur landsstýrið millum annað fyrisett: »Sjúklingurin verður kannaður til viðgerð á donskum sjúkrahúsi ella deild v.m., ið verður rikin ella goldin av statinum, av praktiskum orsøkum helst til Risghospitalet.

Viðgerðin á niðanfyri nevndu sjúkrahúsum deildum er eftir avtalu við ríkisstýrið kostnaðarleyst



(undirstrikað av HM) fyri føroysku sjúkrahúsini: Rigshospitalet herundir Kysthospitalet på Refsnæs, Ortopædisk Hospital í Keypmannahavn, Finsensinstitut, herundir Radiumstationen.

Bert í teimum førum, har tað er heilt greitt, at sjúklingurin ikki kann viðgerast á teimum undir punkt 2 nevndu sjúkrahúsum deildum, skal sjúklingurin kannast til onnur sjúkrahús t.d. Andelsforeningens Gikthospital í Skelskør og Afholdsbevægelsens Behandlingsinstitutter for alkoholskadede«.

Við hesum lógfestu rættindum áttu vit ikki at følt okkum ótrygg, tá ið sjúka noyður okkum av landinum, men um umstøðurnar fyri at fáa serhjálp kunnu gerast uppaftur betri og tryggari, eigur ikki at verða spart og drálað, her má virkast konstruktivt og miðvíst. Tøkkin frá ungum og gomlum fer tá at ljóða: gott í tykkum fyri væl gjørt arbeiði!

Ella:

Fara vit um skamma stund at siga sum á sinni skammleysa Gia: »Gjørt er gjørt«, hon hevði í dansin ski…. Lítið var skilið og minni vitið. Verður tað so forgjørt – og ørt?

**Heri Mohr**

## Framgongd og trivnaður í Klaksvík

Í hesum døgum hava vit fingið tey gleðiligu tíðindi, at økingin í fólkatalinum higartil í ár er stórst í Klaksvíkarøkinum. Endiliga sær tað út til, at fólk so smátt hava hug at búseta seg aftur her norði, og er tað at fegnast um. Tá ið tað er sagt, kemur spurningurin um politikararnir eisini taka hesa avbjóðing í álvara og gera meir enn bert at tosa um trivnað.



Í hesum døgum verður, eftir boðum úr landsstýrinum, arbeitt við at gera eina 5 ára íløguætlan fyri Klaksvíkina. Karmurin at gera íløgur fyri er góðar 16 milliónir, um vit eru einsamøll, og góðar 18 milliónir, um vit finna saman við hinum kommununum í Norðoyggjum.

Øll vita, hvussu afturútsigld vit eru á nógvum økjum í kommununi, skúlarnir, svimjihøllin, barnaansing, mentan, umstøðurnar hjá kommunulæknunum, fyri bert at nevna nøkur øki.

Tey síðstu nógvu árini hevur politikkurin verið eitt slag av salami politikki, har íløgurnar verða smábýttar yvir eina rúgvu av økjum. Úrslitið er, at onki verður liðugt fyrr enn fleiri ár eru farin, og vandi er fyri, at íløgan kostar meir enn, um hon varð gjørd í einum.

Høvdu vit spurt fólk flest, hvat tey vildu havt, at kommunan nýtti t. d 16 mió um árið í 5 ár til, og biðið tey raðfest síni ynski, hugsi eg, ovarliga á listanum høvdu staðið:

- skúlarnar í góðan stand við nýggjum innbúgvi
- undirvísingartilfar, ið fylgir við tíðini
- eina góða svimjihøll
- góðar umstøður til ítrott (kanska eina ítrottarhøll aftrat)
- eina góða læknamiðstøð
- dansihøli/møguleikar til at íðka tónleik
- nokk av ansingarplássum til børn fyri at nevna nøkur øki, ið fólk eftirlýsa eina betri tænastu á. Hvussu fólk raðfesta ynskini veldst um aldur, kyn og áhuga.

Hettar er bara tvætl og typiskt konufólk vil onkur siga, tí tað er stórt sæð tey bleytu økini, ið eg nevni, men har kundi eg svarað, vit hava ikki arbeiðsloysi í Klaksvík, og næst eftir arbeiðið, kemur trivnaður hjá fólki flest.

Tað, ið eg meini, er, at vit skuldu raðfest tey týdningarmestu økini og gjørt íløgur og fingið tey avgreidd komandi 4 árini og síðan farið víðari at útbygt býin. Soleiðis sum fram er farið tey nógvu seinnu árini, loyvi eg mær at seta spurnartekin við, um nóg stórur dentur er lagdur á trivnaðin í býnum, tá ið íløgur vera gjørdar.

Hvat fólkið í Klaksvík heldur, fáa vit ivaleyst eina ábending um tann 14. november.

**Eyðgunn Samuelsen,**
býráðslimur fyri javnaðarflokkin

## Synd í Eidesgaard

Synd er í honum. Hann ger ikki haltari hønu mein – og kortini leggja øll eftir honum, avynnudýrinum Jóannesi. Samgongan og onnur samsint í bløðum og fjølmiðlum hava langtsíðani selt seg til onkran afturfyri at spilla Jóannes út og útinna onkra níðingsgerð ímóti honum. Tað skrivar Virgar T. Dalsgaard í Sosialinum og hann er heiðurligur skilamaður, sum dugir at skyna á muninum á sonnum riddara og demagogiskum dagdroymara-óvita. Einsamallur, men stinnur stendur hesin pragmatiskt hugsandi gævi riddarin Eidesgaard við drignum svørði móti øllum drekum og vindmyllum úr fullveldis dreymasjónum hansara.



Er tað so livandi galið, sum svørðberin Virgar, hesin virðiligi heiðursmaður og fosturlandsvinur, vil vera við, at øll hesi, ið vilja Jóannesi ann, verða samsýnd fyri at hunddálka mannin? ella fyri at gera tað, ið verri er? Hvat gera tey ikki í øðrum londum? Átti landsstýrismálanevndin ikki at kanna slíka álvarsliga hóttan ímóti stoltsriddara okkara? Og hvør er tað sum betalir?

Er nakað at siga til, at Jóannes er óglaður og harmur? »Fornermaður og gronutur«, siga óndar tungur (Sos. 22/9). Og tey siga, at Jóannes er grenjutur, tvørur og mótarbeiðir tingsins meiriluta og saboterar fullveldissamráðingarnar. Tað passar ikki. Hann roynir bara – tær fáu ferðirnar hann sleppur framat – at rættleiða, so sáttliga sum bara hann kann gera tað, í hesu meining og uttan at rópa og kvetta nakran av. Tað, ið gagnar vælferðini best, er bert fyri tey, sum hætta sær at verða búgvandi í hesum partinum av ríkinum so langt burturi frá teimum, ið ábyrgdina hava av okkum. Tað er bara samgongan, ið einans hevur tað í huga, at forarga danir og loypa sum mest split í við at spyrja seg fyri, hvussu vit skulu liva, tá blokkurin er eingin? Hann, Jóannes, hevur ongan baktankar við sínum pragmatiska og realistiska politikki, hann hevur altíð og hvørja ferð, samgongan er komin við onkrum skilagóðum uppskoti, tikið positivt undir við tí og roynt at fingið tað gjørt uppaftur betri, um tað bar til. Tá ið hann av flokkstaktiskum pragmatiskum grundum kortini ongantíð ger tað, men vísir á tað »prinsipielt skeiva« í hesum ella hasum, at »okkurt annað býr undir«, so fær hann av grovfílini frá tíðindafólkunum og øðrum, ið ikki hava tað politiska skil og tev, sum Jóannes og Virgar.

Sjálvstýris-uppskotið, sum Marita Petersen kom við, var eisini hansara einaferð, og tað var Jóannes, ið fekk Edmund til eisini at taka undir við tí. Men so fór Høgni at »læna« burtur úr tí, til einki var eftir og bjóðaði Jóannesi til ein drekkamunn… Jóannes skuldi sleppa at seta síni fingramerki á samráðingaruppleggið (sítt egna og tað stolið). Men tann pragmatiski Jóannes læt seg ikki keypa. Hann gjørdi eitt nýtt uppskot um sambands/sjálvstýri við »evsta valdi« í ríkisfelagsskapi við og uttan ábyrgd, eitt kompromisleyst uppskot, sum vit kunnu samráðast við danir um einaferð, tá ið »vælferðin« í Føroyum er »nóg góð« og Danmark tryggjar okkum eina ævinliga búskaparliga vælferð á hædd við ta donsku og hægri. Men hann fer ikki at greiða gjøllari frá uppskotinum, tí so fer Høgni bara eisini at stjala tað, og Jóannes hevði noyðst at tikið undir við ætlanum landsstýrisins, sum hann innast inni hevur bestan hugin til, var tað ikki tað pragmatiska…

Slíkt »politiskt sjálvmorð« loysir seg heldur ikki, tí Jóannes veit, at samgongan fær einki brúkiligt fullveldisuppskot samtykt á fólkaatkvøðuni, um Javnaðarflokkurin ikki tekur undir við tí, so ella so. Umvent verður helst torført aftaná, at fáa fullveldisfólkini at atkvøða fyri fragmentariska uppskotinum hjá Jóannesi – um tað nakran tíð kemur so langt.

Tað pasar ikki, at Jóannes leggur seg útí spurningin um, hvussu Nyrup-stjórnin og fólkatingið best kunnu forkoma samráðingunum. Tað er ikki neyðugt. Danir vita, hvar teir hava Jóannesi og hann er teimum hentari nú, enn tá ið hann fyrstu ferð kom í fólkatingið. Pragmatikarin veit, sum Virgar, eg og fleiri, at møguleikin fyri at nakað brúkiligt úrslit fæst burtur úr komandi fundunum í Keypmannahavn, er lítið frægari, enn hann var í 1946. Sjálvandi passar hetta opportunistiska pragmatikaranum. Eftir næsta val skal hann nokk saman við teimum, sum tá vilja vera í samgongu við honum, loysa allar slíkar knútar, um danir framvegis vilja gjalda.

Hann hevur so eitt mál, ið hvussu er beint nú. So er tað kanska ikki so synd í Jóannesi kortini? Og nú er hann júst sligin til riddara av so mætum svørðsveini sum Virgari Dalsgaard, og tað við so fínum og sámiligum orðum, at hvørki Henrik ella Torbjørn høvdu kunnað málborið seg betur.

Kanska er tað meira synd í sjálvstýrinum so leingi tað er til fals fyri vælferð og olmussur frá øðrum. Skommin er Føroyafólks - »vanliga fólkinum« í javnaðarflokkinum og teimum »óvanligu« í øllum hinum – og ikki minst tilstundandi løgmansevninum – hvussu tann undanstøkkingurin so fer at eita, ið ræddist at taka medábyrgd.

Eftir landsfundin og eggjandi riddarasløgini frá Virgari fær Jóannes at standa uppaftur stinnari í bardaganum – ikki fyri framhaldandi ábyrgdarloysi – men fyri at slepp audnan at hava ábyrgd, so vit áhgandi kunnu liva í somu forlornu vælferðini, sum útlendsku ábrygdarhavararnir betala, tí tað hava vit rætt til sum brøður og systra rí nýggju pragmatisku sosialdemokratismuni.

**Sverri Egholm**
**22.09.2000**



**Vit bjóða breitt úrval av inventar til:**

- Goymslur
- Arkiv
- Vørubilar
- Arbeiðsrúm

Tosið við okkum!

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 34,
**P/F Sandgrefstur, 530 Fuglafjør›ur.**

**Vi›tøkur broyttar:** 28.06.2000.
**Kapitalur:** Hækking vi› kr. 3.250.000,00 til kr. 3.750.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 3.250.000,00 vi› grunshækking.

Skráseting Føroya tann 25. september 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 1476,
**P/F Á Heygnum, 660 Søldarfjør›ur.**

**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Else Johanne Kathrine Magnussen, 600 Saltangará.
Innkomin í nevndina: Sanna Davidsen, 625 Glyvrar.

Skráseting Føroya tann 25. september 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2926,
**Sp/f Rás 2, 100 Tórshavn.**

**Vi›tøkur broyttar:** 19.07.2000.
**Kapitalur:** Hækking vi› kr. 90.000,00 til kr. 220.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 90.000,00 vi› skuldarumskifti til kurs 100.

Skráseting Føroya tann 25. september 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1238,
**Sp/f Sarong, 240 Skopun.**

**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Juliane Petrea Winther, Luleåvej 16, DK-3950 Ringkøbing (forma›ur), Heidi Winther, 240 Skopun, Rúni Winther, 240 Skopun og Joen Jacob Winther, Luleåvej 16, DK-3950 Ringkøbing.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Heidi Winther, 240 Skopun.

Felagi› er fari› í likvidatión vi› Páll Nielsen, advokati, J. H. Schrøtersgøta 20, Box 85, 110 Tórshavn, sum likvidator.

Skráseting Føroya tann 25. september. 2000.

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2072,
**Sp/f Café Tórshavn, 100 Tórshavn.**

**Vi›tøkur broyttar:** 12.09.2000.
**N‡tt navn:** Sp/f
25.08.2000
**Hjánavni›** Café Natúr er strika›
**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Tina Kruse, Heygsbreyt 16, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Brandur í Dali, Tinghúsvegur 4, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 25. september 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2977,
**Sp/f Málingahandilin á Høgabóli, 620 Runavík.**

**Vi›tøkur broyttar:** 03.08.2000.
**Kapitalur:** Hækking vi› kr. 198.000,00 til kr. 298.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 198.000,00 til kurs 100.

Skráseting Føroya tann 25. september 2000

Kristin Balle

---

Atlantic Petroleum

Vit skulu hervið siga frá at vit eru flutt í nýggj hølir. Nýggja adressan er:



**Gongin 10 • 3. hædd**
**P.O.Box 1228 • FO-110 Tórshavn**
**Tel. 350 100 • Fax 350 101 • E-postur: petroleum@petroleum.fo**

Sosialurin - 311820



**Ellis- & Avlamisheimið í Vágum • 370 Miðvágur**
**Tlf. 332600 Fax 333604**

## Sjúkrasystir

Søkt verður eftir sjúkrasystir at arbeiða í skiftandi vaktum, fulla tíð ella eftir avtalu. Nærri fæst at vita við at venda sær til heimið á telefon 332600.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag føroya.

Umsókn verður at senda til

Stýrið fyri
Ellis- & Avlamisheimið í Vágum
370 Miðvágur

## Frá Norðoya Javnaðarfelag

2. og møguliga 3. uppstillingarfundurin verður í gamla Tekniska skúla í kvøld 27.09. kl. 19.30.

Møtið fjølment!

**Norðoya Javnaðarfelag**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2819,
**Sp/f OrBits, 100 Tórshavn.**

**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Johan Petur Rouch, Spógvavegur 51, 100 Tórshavn, Áki Johansen, Marknagilsvegur 59, 100 Tórshavn og Edvard Sunleif Remberg, Var›abyrgi 9, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Fró›i Magnussen, Oman Vi›arlund 15, 100 Tórshavn, Leivur Rubeksen, Hálsatjørn, 100 Tórshavn og Nikael Mortensen, Tra›argøta 7, 160 Argir.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Áki Johansen, Marknagilsvegur 59, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Nikael Mortensen, Tra›argøta 7, 160 Argir.

Skráseting Føroya tann 25. september 2000

Kristin Balle

---

**Føroyahúsið í Keypmannahavn søkir**

## fólk til kaffistovuna

Kaffistovan í Føroyahúsinum er miðdepilin í húsinum, hagar fólk leita sær innar at lesa bløð, lána bøkur, og keypa sær ein drekkamunn. Men teimum dámar eisini væl at fáa okkurt vælsmakkandi heimabakað afturvið. Javnan eru eisini tiltøk, veitslur ella útleigur, har døgverði ella sjálvtøðuborð er ein týðandi partur.

Stundir skulu vera til tey, sum koma inn á gólvið, eitt prát ella hjálp við upplýsingum ella vegleiðing av alskyns slag. Tað ræður um at viðskiftafólk okkara kenna tað heimligt og hugnaligt í kaffistovuni.

Kaffistovan er eisini mentanarmiðdepil við fyrilestrum, kjakfundum, kafékvøldum, kvøldum við veitslum, konsertum og tílíkum. Tí kunna dagarnir verða sera ójavnir, summir friðarligir og fittligir, aðrir strævnir og kravmiklir. Eisini tá ið slík tiltøk eru, skal havast í huga at vit arbeiða í Føroyahúsinum, sum er miðdepil føroyinga í Keypmannahavn og eitt føroyskt andlit í býnum.

Mong feløg eru í húsinum, sum skulu lívgast, so væl til ber. Eisini feløgini uttanum skulu fáa so góðar sømdir okkum ber til at geva. Feløgini og einstaklingar mynda og skapa lív í húsinum.

Av størsta týdningi er, at tú hevur hug at arbeiða júst í kaffistovuni í Føroyahúsinum. Uttan áhuga, áræði og ágrýtni dugir ikki.

Vit søkja eftir einum fólki k/m, sum serstakliga kann vera við til at skapa omanfyri nevnda karm um kaffistovuna og sum eigur hesar dygdir:

- dugir at matgera og baka
- dugir alt vanligt køksarbeiði
- dugir at meta um brúk og keypa inn
- dugir at lúka neyðug krøv til reinleika og ordan
- hevur áhuga fyri vælferð og trivnað hjá øðrum
- er sjálvbjargin, álítandi og tolin
- er hugað at samstarva við øðrum fólki og sjálvbodnum í húsinum
- lagar seg eftir skiftandi arbeiðstíðum
- dugir at orða seg í talu og skrift á føroyskum og donskum.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast hjá leiðaranum í húsinum, Martin Fjallstein. Umsókn verður send til Føroyahúsið í Keypmannahavn, Vesterbrogade 17A, 1620 København V. Umsóknarfreistin er týsdagin 10. oktober.

**Føroyahúsið í Keypmannahavn**

## Sosialistiskt Ungmannafelag

í Føroyum hevur aðalfund á háskúlanum í Havn 13. oktober kl. 20. Nýggir limir eru vælkomnir við.

**SU**